# um stíli




renningina hjá kvinnum og setti nýtt føroyskt met við tíðini 17 minuttir og 49,7 sekund. Nummar tvey var Súsanna Skylv og á triðja plássi svenska Julia Nilsson.

Í sleggjuvarpi vóru tvær kvinnur í kapping, og her eydnaðist donsku Marie Hansen at vinna á Randi Kúrberg, sum var fyrstu ferð aftur í kapping eftir langan steðg. Og í trístøkki var bara tann eina kvinnan við, sum var svenska Louise Arvidsson, ið hóast sín unga aldur vann við longdini 11,26 metrar, ið er betri, enn nakar hevur lopið í Føroyum í ár.

At enda vóru so 100 metra finalurnar í renning, har talan var um eina finalu hjá kvinnum og bæði A- og B-finalu hjá monnum. Hjá kvinnunum stóð mesta kappingin millum tær báðar svensku, Natalie Tolvers og Louise Arvidsson, ið frammanundan høvdu vunnið ávikavist 800 metra renningina og trístøkk. Natalie vann við tíðini 13,07 sekund framman fyri Louise, og á triðja plássi kom Maiken Olsen.

Í A-finaluni hjá monnum vann Rói Højgaard við tíðini 11,90 sekund framman fyri Dánjal Jákup Niclassen og Røgva Højgaard, ið startaði best, men kortini varð yvirhálaður av hinum báðum. Í B-finaluni vann Kristian Martin Garðalíð.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

**VÆLEYDNAÐ**

***Fyrsta altjóða kappingin í frælsum ítrótti, Jarnatøk, sum var á Tórsbreyt leygardagin, eydnaðist sera væl. Har vóru fleiri góð úrslit og bæði føroyingarnir og útlendingarnir lótu væl at***

*Myndir: Hilmar Jan Hansen*






**DREYMUR**

***– Jatnatøk hevur verið ein gamal dreymur hjá okkum, líka síðani Hvirlan var stovnað, sigur Heri Ziska***

*Mynd: Hilmar Jan Hansen*

# Verður endurtikið

**FRÆLSUR ÍTRÓTTUR – Eg vænti ikki, at Jatnatøk var henda eina kappingin, og at so verður ikki meira. Hetta fara vit nokk at endurtaka, sigur ein av fyrireikarunum leygardagin, Heri Ziska**

**Hilmar Jan Hansen**

– Eg eri nokk so væl nøgdur við úrslitini. Vit fingu nøkur góð úrslit í fleiri av kappingunum og tað bleiv eisini spennandi í fleiri av teimum. Tað var nokk so gott, og yvirhøvur vísti alt seg at rigga øgiliga væl.

Soleiðis tók Heri Ziska saman um kappingina, Jatnatøk, tá hann í einari stuttari viðmerking skuldi eftirmeta á staðnum.

– Hetta er so fyrstu ferð, vit hava hesa kappingina, og vit hava eisini lært, at tað eru nakrir smálutir, ið kanska skulu justerast til næstu ferð, so tað gongur enn smidligari at fáa tað heila avgreitt. Men tað er nú heldur ikki so lætt, tá streymurin fer, tí tá eru vit eitt sindur »på herrens mark«, eitt nú tá vit skulu brúka elektroniska tíðtøku.

Heri helt, at tað var nakað serligt at fáa útlendingar hendavegin at kappast, tí tað gevur teimum føroysku íðkarunum ein møguleika at vísa, hvat teir kunnu.

## Fleiri kvinnur við

– Eitt, ið kanska fær okkum at hugsa eitt sindur, er at í Føroyum halda gentur og kvinnur seg meira aftur enn dreingir og menn, tá tað kemur til frælsan ítrótt, men av útlendingunum, ið vóru við hesa ferð, vóru sjey kvinnur og tríggir menn. Og serliga væl mannaðar vóru útlendsku kvinnurnar í teimum teknisku greinunum, har tað er nokk so torført at fáa kvinnurnar við her í Føroyum. Tí vóni eg, at onkrar av okkara kvinnum hava sæð, at har kundi verið nakað at gjørt meira við, sigur Heri Ziska.

Nú henda fyrsta kappingin av hesum slagi í Føroyum er farin afturum, er kanska í so tíðliga at koma til niðurstøður, men Heri sigur hetta vera ein gamlan dreym, sum hevur verið til, líka síðani Hvirlan varð stovnað, og at ætlanin ikki er, at hetta skal vera einasta kappingin av hesum slagnum.

– Dreymurin er at byggja hetta upp til nakað rímiliga stórt, og serliga at fáa fleiri útlendingar hendavegin, tí tá kunnu vit sleppa at royna okkum ordiliga. Nú sóu vit, at vit fingu góða kapping í fleiri av greinunum, og tað dámdi øllum væl. So eg vænti ikki, at hetta var henda eina kappingin, og at so verður ikki meira. Hetta fara vit nokk at endurtaka, sigur hann.

*hilmarjan@sosialurin.fo*